# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Lóg er lóg

Tá lóggávan um útvarp varð broytt, og tað gjørdist møguligt at seta á stovn privatar útvarps- og sjónvarpstøðir, var politiski viljin, at monopolið skuldi brótast. Hesin hugburður var eisini støðið undir galdandi kringvarpslóg. Hinvegin vita øll, at kappingin á kringvarpsøkinum als ikki er á jøvnum føti. Orsøkin er tann, at almenni kringvarpstovnurin framvegis hevur heimild at krevja brúkaragjald, frá hvørjum húski í Føroyum.

Okkurt kundi bent á, at tingmenn hava verið greiðir yvir tær sera skeivu kappingartreytir, sum teir sjálvir við lógini frá 2006 fóru at varðveita. Løgtingið gjørdi av eftir uppskoti frá mentanarnevndini, at tað til eina og hvørja tíð skulu vera tvær sjálvstøðugar tíðindaeindir. Sjálvandi kunnu vit ikki við vissu siga, hvør orsøkin var til, at Løgtingið soleiðis avmarkaði myndugleika stjórans til at at gera stovnsbygnaðin, men ein grund kann hava verið tilvitanin um, at nýggja lógin lítið og einki broytti við ta monopolstøðu, sum almenna kringvarpið hevði. Tað er í hesum sambandi áhugavert, at Løgtingið eisini í lógargrein álegði stjóranum at taka atlit til journalistiskan førleika, tá ið størv verða sett á tíðindaeindunum. Henda støða løgtingsins kann eisini vera orsøkin til, at Løgtingið avmarkaði møguleikar almenna kringvarpsins at vinna penning við netlýsingum.

Hóast ásetingarnar í lóginini hevur KVF skipað seg við eini og somu leiðslu fyri tíðindatænastuni og hevur henda avgerð skapað iva, hvørt hetta er í samljóði við lógina. Tað er tí í tøkum tíma, at málið nú verður reist á tingi. Tað er, sum ikki einaferð Tórbjørn Jacobsen, ið tekur um notuleggin. Hann vil hava landsstýriskvinnuna í mentamálum at tryggja, at kringvarpslógin verður fylgd, og at Kringvarpið hevur tvær sjálvstøðugar tíðindadeildir. Tórbjørn Jacobsen vil hava at vita frá landsstýriskvinnuni í mentamálum, hvat hon ger fyri at tryggja, at ásetingin í kringvarpslógini um, at tað skulu verða tvær sjálvstøðugar tíðindadeildir í Kringvarpinum, verður fylgd. Tórbjørn Jacobsen, sum var limur í mentanarnevndini hjá løgtinginum, tá nýggja kringvarpslógin var fyri har, sigur, at ætlanin var als ikki, at tíðindadeildirnar í samanlagda kringvarpsstovninum skuldu leggjast saman. Tað er gott, at hetta mál nú nærkast eini avkláring. Vit á privata fjølmiðlaøkinum kenna kappingartreytirnar í Føroyum, og vit noyðast helst at liva og mennast undir hesum sera ójøvnu og órættvísu kappingartreytum. Vit unna sjálvsagt KVF alt gott, og sjálvandi skal okkara sterkasti mentanarberi hava góðar umstøður. Hinvegin kann almenningurin illa liva við, at ivi er um, hvørt leiðslan á okkara almenna kringvarpi heldur lógina.

**Sosialurin**

## Tórshavnar kommuna skal gerast burðardygg

**ELIN LINDENSKOV**
Javnaðarflokkurin



Javnaðarflokkurin í Tórshavnar býráð strembar eftir at gera kommununa burðardygga. Orkunýtsla og orkutørvur verður í løtuni skrásett í øllum kommunalum bygningum. Næsta stigið er at gera burðardygga ætlan fyri orkunýtsluna, soleiðis at kommunan brúkar sum minst av dálkandi orku.

Húsarhaldini í Føroyum eru næststørsta dálkingarkelda. Tí er umráðandi at herða krøvini til bygging og umbygging av bygningum. Kommunan skal ganga á odda at eggja og vegleiða øllum borgarum og vinnuni í orkumálum. Tá gerast vit øll vinnarar, kommunan og hvør einstakur vinnur pening, samstundis sum útlátið minkar. Somuleiðis vilja vit seta krøv til veitarar, t. d. tá ið høli skulu leigast, skal orkuvirksemi vera so høgt sum gjørligt.

Okkara mál er ein burðardygg kommuna. Ein kommuna, har øll orka kemur frá varandi orkukeldum. Hesum vil Javnaðarflokkurin í býráðnum framhaldandi virka fyri. Set X við lista C 11. november, tá er tú við til at gera Tórshavnar kommunu til eina burðardygga kommunu.

## Takk til Thomas M. Smith!

**MARTHA RESTORFF**

Tað var ein sonn fragd at lesa stutta lesarabrævið hjá Thomas M. Smith um eggini av Velbastað. Eri so púra samd!

Ikki bara at tey smakka væl, men gleðin við at tey eru føroysk og frá hønum, ið hava tað gott (leysgangandi hønur og ikki búrhønur).

Vóni so inniliga at vit síggja eggini aftur á hillunum her.

Og so kann eg ikki lata vera við at skriva um tað eg havi grenjað um so nógv ár. Hvussu ber tað til, at vit ikki eru raskari at stuðla einari føroyskari fyritøku, sum fer undir at framleiða eina (oftast) betri vøru enn allar hesar discountvørurnar, vit fáa aðrastaðni frá? Havi leingi grenjað um t.d. allar plattarnar av vánaligum, útlendskum sodavatnslíknandi pjaski, sum vit kunnu keypa í handlunum.

Vit banna bæði eitt her og annað har, seta ovurprís á grønar køkur og alt hatta tvætlið við søluni av brennivíninum til okurspris. Hví banna vit ikki at innflyta allar útlendskar vørur, sum vit á ein ella annan hátt framleiða sjálvi her á landi? Vit hava stakgóð egg, fantastiskar kondittarakøkur og breyð, leskiligastu mjólk og mjólkaúrdrátt, eitt tað besta vatnið at gera sodavatn av og so ikki at tala um góðskumetta Føroya Bjór ølið, sum fær eina gullmedalju fyri og aðra eftir (og tað skrivar hon við tí "belastaða" eftirnavninum).

Gott í tykkum klóku her á landi: stuðlið okkum sjálvum, keypið føroyskt framleitt, so hønurnar á Velbastað fáa lív lagað, MBM fær eitt langt lív og ikki minst nú, at tey har norðuri kunnu fáa loyvi at bryggja sterkari enn gull. Lesið brævið hjá Th. M. Smith og hyggið, hvussu lítið tað ger mun reint peningaligi.

## Finnleif Guttesen í cyberspace!

**FINNLEIF GUTTESEN**



11. november er kommunuval og ætli eg mær at stilla upp.

Í hesum sambandi havi eg gjørt mær eina blogsíðu á alnótini, har eg fari at vísa á, hvussu illa Tvøroyrar kommuna er rikin seinastu 4 árini og hvussu ótrúliga lítið skattgjaldarin hevur fingið burturúr, tó at inntøkurnar hjá kommununi er vaksnar munandi og lítið er gjørt fyri at niðurgjalda skuldina.

Eg fari m.a. at vísa ítøkilig dømi um tað, sum eg meti vera ivasama nýtslu av skattgjaldarans peningi og beinleiðis ørvitisverkætlanir, ið býráði hevur havt ætlanir um.

Vitja www.finnleif.blogspot.com og fá eyguni upp fyri, at við verandi leiðslu endar Tvøroyrar kommuna aftur sum stórskuldari.

Niðurbundin, uttan menningarmøguleikar og sum veikur og óviðkomandi samstarvspartnari hjá øðrum.

**Gjald fyri valgreinar**

Fram til kommunuvalið 11. november fer Sosialurin at taka gjald fyri valgreinar. Gjaldið er hálvur lýsingarprísur fyri t. e. 95 oyru + MVG fyri millimeturin. At rokna sum valgreinar eru allar greinar, sum valevni skriva - og geinar frá øðrum, sum blaðstjórnin metir sum valtilfar. Skipanin verður í gildi fram til kommunuvalið. Valgreinar skulu sendast við telduposti til post@sosialurin.fo - og tær skulu vera rættlisnar og harvið púra klárar at prenta.

**Blaðstjórin**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.